# eisini mennast

*Í Kolbeinagjógv er ein bátabryggja, her bátar ikki kunnu liggja tryggir alt árið. Men áhugi er kortini fyri at henda kann gerast partur av alivirkseminum hjá Vestlaks*



*Ein kann ikki steðga menningini í eini bygd, bert tí at ein ikki vil taka eina gamla rætt niður*

um førum einki upp í bygdini.

Svarið sum tey hava fingið frá hagastýrinum er, at rættin hevur ligið har í so langa tíð og tí skal hon ikki flytast.

- Hetta er ein rættiliga onkisigandi grundgeving eftir mínum tykki. Lá ikki ein rætt á Rættartrøðni í Havn fyri nógvum árum síðani? Ongin segði nakað til at hon var flutt. Men hví skal tað verða øðrvísi her?

- Ein kann ikki steðga menningini í eini bygd, bert tí at ein ikki vil taka eina gamla rætt niður. Eg dugi ikki rættiliga at skilja, at seyður og neyt skulu hava slíkan framíhjárætt.

- Eg trúgvi, at um viljin veruliga var til staðar, so kundi ein tosað seg til rættis: Út frá hesum kundi hetta økið verðið nýtt til eitt annað endamál, samstundis sum hinir fingu eina nýggja rætt á øðrum staði, vísir Meinhard Jacobsen á.

Kommunan hevur sjálv ein langan lista við fólki, ið ynskja grundøki. Og við ætlaða Skálafjarðartunlinum í ljósmála, er lítil ivi um, at fólk í framtíðini fara at vilja búseta seg her í Kolbeinagjógv.

Sjóvar kommuna hevur eisini verið so framsíggin, at tey hava gjørt eina spennandi menningarætlan. Her verður sagt frá nøkrum hugskotum um, hvussu kommunan kann verða ment og útbygd í framtíðini.

Í hesi ætlanini varð Kolbeinagjógv eisini nevnd, millum annað við bústaðarmøguleikum. Tá koyrandi verður beinleiðis til Havn, verður skjótt og einfalt hjá fólki at búgva her og fara til arbeiðis í Havn.



*- Eg dugi ikki rættiliga at skilja, at seyður og neyt skulu hava slíkan framíhjárætt, sigur Meinhard Jacobsen, sum her stendur frammanfyri rættina og á tí økinum, sum eins væl kundi verið nýtt til sethúsabygging*

## Lív og virksemi á landi

Í Kolbeinagjógv finnast eingi arbeiðspláss í dag. Menn sigla fyri tað mesta, og kvinnur arbeiða ymsastaðni á Strondum.

Tó er kortini ikki óhugsandi, at eitthvørt vinnuligt virksemi kann fara fram í lítlu bygdini: Kolbeinagjógv er nevniliga útgjørd við eini lítlari atløgubryggju.

Henda atløgubryggjan er kortini ikki so trygg, at bátar kunnu liggja trygt her alt árið. Hon varð gjørd seinast í 30'unum, stutt eftir at fyrstu húsini vórðu bygd.

Men tíðarinnar tonn hevur eisini slitið uppá hana, og í dag er hon í ringum standi, tí nógv í henni hongur meiri og minni í leysari luft.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at beint út fyri bygdina hevur Vestlaks eitt av stóru alibrúkum sínum.

Leiðslan í fyritøkuni hevur víst áhuga fyri at bøta um bátahylin, soleiðis at teir kunnu nýta hann í sínum virksemi bæði summar og vetur. Her er hugsanin at gera eina felags loysn, har kommunan rindar ein part og fyritøkan sín part fyri arbeiðið.

Í dag verður arbeiðið skipað út frá Kollafirði, men Meinhard ivast kortini ikki í, at varð ein slík loysn veruleiki, hevði tað bøtt munandi um arbeiðsumstøður og siglingartíð hjá alibátunum, samstundis sum hetta hevði skapað lív og virksemi á landi.

- Eg havi lagt henda spurning fyri vinnunevndina í kommununi um at tosa við Vestlaks, men enn er so einki hent í hesum máli.

- Men eg ætli mær ikki at gevast, tí eg meti at hetta er ein spennandi ætlan, sum fer at gagna bæði bygdini og kommununi, slær Meinhard Jacobsen fast.